Nýggjur táttur í Sosialinum

KRIMI

# Hópdrepandi fívilin

**John Wayne Gacy fær ein at hugsa um western-hetjuna á hvíta løriftinum, men meðan hesin stríddist móti blóðtystum indianarum og øðrum ránsmonnum, hevði Gacy eina minst líka blóðugta lívsleið – men hetta var í veruleikanum. Tá hann endiliga varð avdúkaður, bleiv hann dømdur og avrættaður fyri minst 33 dráp á ungum dreingjum**



*John Wayne Gacy varð dømdur fyri at hava dripið 33 ungar dreingir. Men talið kann hava verið munandi hægri enn tað*

*Hópdrápsmaðurin var altíð ógvuliga hjálpsamur, og hann undirhelt javnan smáum børnum á sjúkrahúsunum, oftast sum fívil (klovnur)*



**HÓPDRÁP**

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í Chicago feiraðu John Wayne Gacy og konan, Marion Elaine Robinson Gacy, lítla nýføðingin, sum fekk navnið John Wayne Gacy, Jr.

Hetta var á sjálvum St. Patrick's Day, ein írskur hátíðardagur. John var mittastur av trimum systkjum og føddur í 1942.

Hann vaks upp í einum meðalklassa samfelagið, og tað var vanligt, at ungir dreingir høvdu arbeiðir eftir skúlatíð, og soleiðis var eisini hjá John Wayne Gacy. Hann bar dagbløð út og arbeiddi í einum matvøruhandli.

Ellivu ára gamal spældi hann á einum spæliøki við reiggjum, og ein av hesum rakti hann í høvdið. Hann fekk ein blóðtøpp í høvdið av hesum, men hann varð ikki uppdagaður fyrr enn John var sekstan ára gamal. Í árunum millum ellivu og sekstan fall hann ofta í óvit, men hetta helt uppat, tá hann fekk heilivág at uppløysa blóðtøppin.

Seytjan ára gamalur fekk hann staðfest hjartafeil, tó at læknarnir ikki funnu fram til, júst hvør feilurin var. Hann gramdi seg javnan um pínu, serliga eftir handtøkuna, men hevði tó ongantíð nakran álvarsligan hjartatilburð.

Viðurskiftini við pápan vóru ongantíð góð. Pápin var drykkjumaður og bukaði konuna, meðan hann í heilum skeldaði børnini. Hóast hetta var John ógvuliga góður við pápa sín og vildi fyri alt í verðini kenna hansara kærleika. Men tað hendi ikki, og hann og pápin komu ongantíð at standa hvørøðrum nær. Og tað angraði John Wayne Gacy Jr. til sín doyggjandi dag.

Eftir at hava skift skúla fýra ferðir uttan at fáa prógv, gavst Gacy við skúlagongdini og fór til Las Vegas. Men har var einki serligt at vera, tí tað var sera trupult hjá einum við ongum skúlaprógvi at fáa eitt starv. Hann mátti tí spara saman í tríggjar mánaðar áðrenn hann hevði ráð til ferðina heimaftur.

Fyrst í 60-unum meldaði hann seg inn á ein handilsskúla og fekk endiliga eitt prógv. Meðan hann gekk har menti hann síni evni sum sølumaður. Hann kundi nevniliga tosa seg uppí og burtur úr øllum. Tað var so skjótt eftir, at hann hevði fingið starv sum skósølumaður, at hann var sendur til Springfield í Illinois at leiða ein handil við mannfólkaklæðum.

### Niður á bakka

Meðan hann var í Springfield gjørdist heilsan aftur verri og stutta tíð eftir at hava ligið á sjúkrahúsi mátti hann aftur innleggjast, hesaferð fyri skaða í rygginum.

Hetta helt honum ikki frá at vera ógvuliga nógv úti um seg í nærsamfelagnum, og hann var limur í fleiri feløgum eins og hann einaferð var kosin ársins maður. Fólk sum kendu hann tá, mettu hann vera ein strembara.

Í 1964 giftist Gacy við Marlynn Myers, einum starvsfelaga. Foreldur hennara áttu eina røð av Kentucky Fried Chicken-matstovum í Waterloo, Iowa, og verfaðirin, Fred W. Myers, bjóðaði honum starv í einum av hesum matstovunum. Tískil flutti nýgifta parið til Iowa.

Lívið sá veruliga ljóst út fyri Gacy um tað mundið.

Gacy arbeiddi nógv, vanliga einar tólv tímar um dagin, onkuntíð meir. Og tá hann ikki arbeiddi, gjørdi hann sjálvboðið arbeiði í felagsskapinum Jaycee.

Men hóast Gacy arbeiddi nógv, hevði hann eisini tíð til konuna, og stutt eftir, at tey vóru flutt til Iowa, fingu tey ein son. Og stutt eftir tað eina gentu. John var altíð í sving, men hevði kortini tíð at seta eina valherferð í verk at gerast formaður í Jaycee.

Konan var væl nøgd við at ansa børnunum og John somuleiðis væl nøgdur við arbeiðið og sítt sjálvboðna arbeiði, so alt í alt tóktist lívið at vera ov gott at vera satt. Og tað var tað eisini, skuldi tað vísa seg.

Slaturin byrjaði at ganga um kynsliga áhugan hjá Gacy. Ungir dreingir vóru alla tíðina um Gacy, og slaturin um, at hann var homoseksuellur gekk sum rótasúpan í nærumhvørvinum. Men tey, sum stóðu honum nærmast, vildu ikki trúgva hesum. Ikki fyrr enn í mai 1968, tá slaturin gjørdist veruleiki.

Um várið varð Gacy ákærdur fyri at hava bundið og neyðtikið ein ungan drong, Mark Miller at navni. Hesin greiddi frá, at Gacy hevði lokkað hann inn í húsini hjá sær, og síðani bundið og neyðtikið hann. Gacy hinvegin vildi vera við, at drongurin sjálvboðin hevði havt kynsligt samband við seg, og at tað var illvilji frá Jaycee, sum hevði fingið dreingin at gera hetta móti sær.

Gacy rindaði einum øðrum ungum dreingi yvir tríhundrað dollarar fyri at buka Miller, men tað kom honum aftur um brekku. Hann varð dømdur tíggju ára fongsul. 26-ára gamal fór hann inn at sita, og konan kravdi hjúnarskilnað, sum hon eisini fekk.

### Tað snarar um

Gacy var kortini so skilagóður, at hann helt seg langt burtur frá trupulleikum og var ein fyrimynd sum fangi. Úrslitið var, at hann var royndarleyslatin longu eftir átjan mánaðum, og flutti aftur til heimbý sín, Chicago.

Hann flutti inn til mammu sína og fekk starv sum kokkur á einari matstovu. Har fall hann ógvuliga væl til, og stutt eftir, fyrsta juni 1972, giftist hann teirri fráskildu Carole Hoff, sum hevði tvær døtur.

Grannarnir, sum Gacy hevði bjóðað heim til sín við jøvnum millumbilum, høvdu støðugt sína gongd í húsunum. Tey vóru errin av, at ungu grannahjúnini vildu hava tey á vitjan, sjálvt um tey ikki brúggjaðu seg um ringa luktin í húsunum hjá Gacy-familjuni.

Onnur gjørdu eisini vart við undarliga luktin, men Gacy slerdi tað upp í glensl.

Í 1974 gjørdi Gacy av, at byrja fyri seg sjálvan. Hann stovnaði fyritøkuna Máling, Dekorering og Viðlíkahald (Painting, Decoration and Maintenance, stytt PDM). Hann fekk ungar dreingir at arbeiða hjá sær, fyri at halda lønarútreiðslunum niðri, sum hann greiddi vinfólki frá.

Men tað var bara hálvur sannleiki, og hansara homoseksuellu girndir gjørdust alsamt sjónligari, serliga fyri konu hansara. Hetta førdi eisini til hjúnaskilnað í mars 1976.

Eftir hetta hevði Gacy einki at ræðast, og ungir dreingir í hópatali hvurvu í økinum. Ikki fyrr enn ein ungur drongur nevndur Robert Priest hvarv og móðir hansara setti umfatandei leiting í verk, kom navnið hjá John Wayne Gacy framm. Tí tað var hann, ið hevði bjóðað Priest arbeiði í fyritøkuni hjá sær, PDM.

Gacy varð tikin inn á politistøðina til avhoyringar, men segði seg einki vita um dreingin, og slapp tí avstað aftur. Politisturin við ábyrgd fyri málinum gjørdi av, at kanna Gacy nærri, og fann undrandi útav gomlu fongsulsrevsingini hjá Gacy. Stutt eftir fekk hann eina rannsakingarváttan til húsini hjá John Wayne Gacy.

### Endiliga avdúkaður

13. desember 1978 granskaði løgreglan so húsini hjá Gacy. Men teir funnu í fyrsta umfari einki, sum var serliga illgrunasamt í sambandi við Robert Priest. Teir avhoyrdu vinir hjá Gacy, men tað gav heldur einki úrslit. Teir gjørdu so av at handtaka Gacy fyri marijuhana og valium.

Seinni komu upplýsingar fram sum gjørdu, at løgreglan enn einaferð kannaði húsini hjá Gacy. Hesaferð kannaðu teir gjøllari og funnu skjótt leivdirnar av einum líki undir kjallaragólvinum.

Tað gekk ikki long tíð, so hevði kanningarliðið funnið fleiri lík, og tá avtornaði var talið komið upp á 33.

Hetta gjørdi John Wayne Gacy til ein av allarstørstu hópdrápsmommunum í søguni. Ofta nýtti hann »snýti«-hondjørn at fanga ungu dreingirnar við. Hann læsti tey um hondliðini á sær sjálvum og loysti seg síðani úr teimum. Men tá ungu dreingirnir skuldu royna, nýtti hann óvarandi veruliga hondjørn, og so vóru teir fangaðir og kundu lítið og einki gera.

Líkini gróv hann so niður í grulvikjallaranum, og sprændi sitrónlukt omanyvir. Hetta gekst væl í fleiri ár, líka inntil hendan mamman hjá Robert Priest førdi til avdúkingina.

Í rættinum hevði Gacy ikki so nógv at verja seg við, og tað endaði eisini við, at hann varð dømdur sekur í øllum ákærunum. Revsingin var deyðadómur, og hesin varð avgreiddur í 1994.

Men í søgubókunum er John Wayne Gacy ein av herviligastu hópdrápsmonnunum í amerikanskari søgu.